Fróðskaparsetur Føroya

27. mars 2009

**Fundarfrágreiðing til stýrisfund nr. 4/2009**

Dagur og klokkutíð: Hósdagin 26. mars 2009 kl. 15 – 17.30

Fundarstað: Setursskrivstovan

Til staðar: Lis Mortensen, stýrisforkvinna, Jan Mortensen, næstformaður, Anni Djurhuus, Winny í Pætursastovu, Jim Brown, Jóan Pauli Joensen, rektari, Rúna Hjelm, fyrisitingarstjóri og Hugin Skaalum, fíggjarleiðari.

Í telefonini vóru: Tove Bull og Juanna S. Joensen

**Dagsskrá:**

1. **Góðkenning av 3/2009 stýrisfundi 12. og 13. mars 2009.**
Av tí at viðmerkingar til fundarfrágreiðingina vantaðu, varð frágreiðingin ikki góðkend á fundinum.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
Dagsskráin varð góðkend.

3. **Fíggjarjáttan - Sparingar í 2009.** (J.nr. (3) 10-12-20070011).
Undir viðgerðini av hesum máli varð ein frágreiðing um fíggjartørvin fyri 2009 og eitt innanhýsis notat um sparingar á deildunum á Fróðskaparsetrinum viðgjørt av stýrinum. Samtykt varð, at leiðslan á Fróðskaparsetrinum skal gjøgnumføra sparingarnar í uppskotinum undir punktunum 2, 3 og 4, meðan bíðast skal við sparingini undir punkti 1. Arbeiðast skal víðari við at finna loysnir, soleiðis at neyðuga sparingin kann røkkast og ein niðurstøða gerast av stýrinum millum funda.

4. **Upptøka av nýggjum bachelorlesandi í stjórnmálafrøði á Søgu- og samfelagsdeildini á heysti 2009.** (J.nr. (3) 10-40-20070023).
Stýrið heldur, tað er eitt gott initiativ frá Søgu- og Samfelagsdeildini, ið hevur ætlanir um at taka nýggj lesandi til bachelorlestur í stjórnmálafrøði á heysti 2009. Grundað á tær ressursir, sum deildin hevur í dag, og tey ótryggu fíggjarligu útlitini heldur stýrið tað kortini ikki vera ráðiligt at taka nýggj lesandi inn á Søgu- og Samfelagsdeildini í ár. Stýrið skal hinvegin saman við deildar- og setursleiðsluni arbeiða við einari langtíðar menningarætlan av

Poststaður Postrúm 272 FO 110 Tórshavn | Bústaður J. C. Svabos gøta 14 FO 100 Tórshavn | Heimasíða www.setur.fo | T-postur setur@setur.fo | Telefon 35 25 00 | Faks 35 25 01

útbúgvingunum á Fróðskaparsetrinum, sum fyrst skal leggjast fram fyri tann politiska myndugleikan til góðkenningar. Útbúgvingarnar á SSD verða partur av hesi ætlan.

5. **Fíggjarlógaruppskot fyri 2010.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070008).
Stýrið er valt fyri allar deildir og skúlar á Fróðskaparsetrinum, og tí er tað sera umráðandi, at Mentamálaráðið tekur neyðug atlit í sambandi við fíggjarlógararbeiðið 2010 við at leggja sjálvstøðugu rakstrarstøðini hjá Læraraskúlanum og Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum undir eitt felags rakstrarstað undir Fróðskaparsetri Føroya, soleiðis at stýrið fær høvi til at gera ein felags fíggjarkarm og heildarraðfestingar fyri alt virksemið á stovninum. Í dag er játtanarkarmurin sera stirvin og stuðlar ikki upp undir ta í nýggju seturslógini ætlaðu samanleggingartilgongdina.

6. **Ymist**
Á fundinum vóru ymisk viðurskifti viðvíkjandi arbeiðsbýti og -hátti hjá stýri og leiðslu á Fróðskaparsetrinum til umrøðu. Stýrið er í ferð við at gera reglugerð fyri arbeiðið hjá stýrinum og leiðsluni á Setrinum, men til hesar reglir eru klárar, varð samtykt, at stýrið skuldi seta upp nakrar einfaldar reglar, sum leiðsla og stýri kundi samskifta eftir. Fundarfrágreiðingin er eitt sera týdningarmikið amboð hjá leiðsluni at stýra eftir, og um tey samtyktu málini skulu avgreiðast skjótt, er neyðugt at avmarka tíðina, sum stýrislimirnir hava til viðgerð av fundafrágreiðingum. Við nýggju lógini um Fróðskaparsetur Føroya er neyðugt at gera nakrar nýggjar mannagongdir fyri arbeiðsbýti millum stýrisformann og rektara. Samtykt varð, at arbeiðsbýtið millum stýrisformann og rektara skuldi praktiserast soleiðis, at leiðslan tekur sær av sambandinum innanhýsis og øllum vanligum akademiskum viðurskiftum, sum náttúrliga hoyra undir rektaran, meðan tað er stýrið við forkvinnuni á odda, sum tekur sær av tí yvirskipaða sambandinum úteftir, herundir serliga sambandinum við Mentamálaráðið.

Fyrisitingarstjórin kunnaði um, at kunningarfundur verður fyri teimum lesandi á Søgu- og Samfelagsdeildini mánadagin 30. mars á deildini.

**Næsti stýrisfundur verður 6. og 7. mai 2009.**